gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Norðoyastevna

**Nummarrøðan á bátunum, sum fara at rógva kapp á norðoyastevnu**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*

Lutur er nú kastaður, hvussu bátarnir á skulu liggja, tá farið verður í holt við ársins fyrsta FM-róður, ið sum vant verður á norðoyastevnu í Klaksvík.

Hetta er einastu ferð á árinum, at lutur verður kastaður um, hvussu bátarnir skulu liggja. Fyri nøkrum árum síðani gjørdi Róðrarsambandið av, at plaseringarnar á undanfarnu róðrunum skuldu verða avgerandi fyri, hvussu bátarnir skulu liggja komandi stevnurnar.

Tað vil siga, at vinnararnir á norðoyastevnu fáa startnummar í miðjuni til komandi róðurin. Fyrimunirnir við hesum eru fyrst og fremst, at tilvildin í nógv minni mun sleppur at valda, so sum talan ofta var um fyrr, tí streymurin kann gera góðan mun, og so sjálvandi eisini, at teir bátar, sum væntandi standa seg best undir róðrinum, verða plaseraðir lið um lið, og at róðurin á tann hátt gerast meira áskoðaravinarligur.

**5-mannafør, dreingir**
1 Firvaldur
2 Erla Kongsdóttir
3 Frúgvin
4 Fípan Fagra
5 Sílið
6 Drekin
7 Beinta
8 Tjaldrið
9 Havfrúgvin
10 Báran
11 Blikur

**6-mannafør, kvinnur**
1 Sólmundur
2 Leirvíkingur
3 Víkingur
4 Jarnbardur
5 Páll Fangi
6 Lómur
7 Fortúna
8 Hvessingur
9 Gongurólvur

**5-mannafør, gentur**
1 Sílið
2 Havfrúgvin
3 Snípan
4 Fípan Fagra
5 Firvaldur
6 Frúgvin
7 Hvassi
8 Drekin
9 Báran
10 Tjaldrið
11 Spógvin
12 Ørnin
13 Dúgvan
14 Blikur

**6-mannafør, menn**
1 Strálan
2 Páll Fangi
3 Snopprikkur
4 Fuglfirðingur
5 Sølmundur
6 Hvessingur
7 Gongurólvur
8 Fortúna
9 Riddarin

**8-mannafør**
1 Argjabáturin
2 Kvívíkingur
3 Knørrur
4 Nevið Reyða
5 Ørvur
6 Ormurin Langi

**10-mannafør**
1 Vestmenningur
2 Eysturoyingur
3 Skálabáturin
4 Nólsoyingur
5 Havnarbáturin

# Munurin kann økjast



*Hvørki B68 ella B36 hava ráð at missa nakað, tá tey sunnudagin hittast á Svangaskarði*

**Tað er als ikki óhugsandi, at munurin millum GÍ og hini er øktur, tá vikuskiftið er av**

UPPTAKT
Jákup Mørk

Eftir at landsliðið í eina viku hevur roynt at givið fótbóltshugaðum føroyingum sítt, eru tað nú aftur feløgini, sum eiga tørn.

Byrjanin verður to kanska heldur spakulig, tí fyri fleiri av liðunum, er hetta vikuskiftið galdandi, at talan er um greiðan favorittleiklut. Líka mikið, hvussu tey vilja skáka sær undan, so er einki at ivast í, at GÍ, KÍ og HB eru favorittar, tá tey taka ímóti FSV, EB/Streymi og B71.

### Týdningarmikið hjá øllum

Er talan um greiðar favoritt-leiklutir í teimum trimum áður nevndu dystunum, so tykist stór óvissa at vera um hinar báðar dystirnar.

Í Vági fer NSÍ á vitjan hjá føroyameistarunum, og fyri bæði liðini má sigast, at talan er um ein rættiliga avgerandi dyst. Hetta tí taparin meira ella minni má roknast sum fráverandi í stríðnum um heiðusmerki. Eitt stríuð, sum báðir partar siga seg vilja taka lut í, men har hvørgin parturin hevur ráð at missa stórvegis av stigum.

Er spennigurin stórur í Vági, er hann neyvan minni á Toftum. Eftir eina heldur laka byrjan, hava seinastu tveir dystirnir kastað seks stig av sær, og á Toftum ætlan tey helst ikki, at B36 skal seta teimum kílar fyri í royndunum at koma fyri seg aftur.

Toftamenn vilja nevnliga heldur enn fegnir verða partur av oddastríðnum, og tí er tvingandi neyðugt við einum sigri.

Tað er tað hinvegin eisini hjá B36, sum í løtuni er á øðrum plássi. Vónirnar eru settar til eitt FM-heitið, hvørki meira ella minni, og tá tað ikki skal roknast við, at GÍ missir stig, so kann longu stóri munurin økjast enn meira, um B36 ikki fær fulla úrtøku úr sínum dysti.

### Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 5 | 5 - 0 - 0 | 14 | 5 | 9 | 15 |
| 2 | B36 | 5 | 3 - 1 - 1 | 22 | 4 | 18 | 10 |
| 3 | HB | 5 | 3 - 0 - 2 | 10 | 7 | 3 | 9 |
| 4 | KÍ | 5 | 3 - 0 - 2 | 7 | 7 | 0 | 9 |
| 5 | NSÍ | 5 | 2 - 2 - 1 | 6 | 5 | 1 | 8 |
| 6 | B68 | 5 | 2 - 1 - 2 | 9 | 11 | -2 | 7 |
| 7 | VB | 5 | 2 - 0 - 3 | 13 | 7 | 6 | 6 |
| 8 | B71 | 5 | 1 - 0 - 4 | 5 | 11 | -6 | 3 |
| 9 | EB/Streymur | 5 | 1 - 0 - 4 | 4 | 10 | -6 | 3 |
| 10 | FS Vágar | 5 | 1 - 0 - 4 | 3 | 26 | -23 | 3 |

Dystirnir um vikuskifitð eru annars hesir:
GÍ-FSV
KÍ-EB/EB/Streymur
HB-B71
VB-NSÍ
B68-B36

# B36 hevur vent gongdini

**B68 hevur ikki vunnið á heimavølli móti B36 seinastu fimm árini**

HAGTØL
*Jákup Mørk*

Hóast hagtølini enn ikki hava avgjørt nakran dyst, so skerst ikki burtur, at summir vøllir roynast verri enn aðrir hjá flest øllum liðum.

Hjá B36 var tað fram til 1997 soleiðis, at á Svangaskarði kundu teir gloyma alt um stig, men síðani tá er av álvara komi vend í. B36 hevur nevnliga vunnið fimm teir seinastu útidystirnar móti B68.

Sæð burtur frá hesum dystinum, so hava heimaliðini so avgjørt yvirtakið í uppgerðunum, sum verða spældar sunnudagin.Mest spennandi tykist kanska verða í Vági, har NSÍ oftani hevur órógvað. Talvan niðanfyri sýnir, hvussu tað hevur gingist, seinastu 10 árini, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst.

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ-FSV | 5-1 | - | - | 2-2 | 7-0 | 2-1 | - | - | 3-1 | 3-0 | 5-1-0 | 22-5 |
| KÍ-EB/Str. | - | - | - | - | - | - | 8-2 | - | - | - | 1-0-0 | 8-2 |
| HB-B71 | 1-0 | 7-1 | - | 5-0 | 4-2 | 1-0 | 1-0 | 3-0 | 0-3 | - | 7-0-1 | 22-6 |
| VB-NSÍ | 3-1 | 2-0 | 0-5 | 3-0 | - | 1-3 | - | - | 2-1 | 2-0 | 5-0-2 | 13-10 |
| B68-B36 | 1-3 | 1-2 | 2-3 | 0-3 | 1-0 | 2-0 | 0-0 | 0-0 | 0-0 | 0-0 | 2-4-4 | 7-11 |

gult15 cyan15 magenta15 svart15

Vikuskifti

Nr. 108 • leygardagur • 9. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

LEGO skuldsett fyri halgibrot

Lesið á síðu 2





# Alheims stjørnan er komin

**Uttan samanbering er Garry Kasparov víðgitnasti persónur, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum. Niðanfyri verður nortið við nakrar av orsøkunum til, at so er**

TALV
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at eingin so navnframur persónur sum Garry Kasparov nakran tíð hevur sett føtur sínar á klettar okkara her í Norðuratlantshavinum.

Hóast tað millum ár og dag hava verið hópin av ítróttastjørnum. politikkarum, umhvørvisaktivistum og øðrum, so røkkir eingin teirra russiska talvkonginum til kníggja. Alla staðni í heiminum vita fólk, hvør hesin maðurin er, hvat hann stendur og hví hann er vorðin somikið kendur.

Fremsta vápn hansara í bergtakanini av heiminum er sjálvsagt ótrúligi talvheili hansara, við evnum til at gjøgnumskoða at kalla allar mótstøðumenn sínar. Ein heili, sum hevur gjørt tað gjørligt hjá Kasparov at sita 15 ár á alheims talvtrúnuni, og hóast hann fyri stuttum varð feldur av Vladimir Kramnik, so er Kasparov framvegis hæst styrkismetti telvarin í heiminum, og roknað verður fyri vist, at Kramnik ikki skal rokna við at gerast gamal á trúnuni.

### Uppvøkstur

Garry Kasparov varð borin í heim í høvuðsstaðnum í Aserbadjan, Baku, og ikki óvæntað løgdu fólk skjótt til merkis óvanliga talentið, sum pilturin hevði. Longu sum seks ára gamla telvaði hann móti pápa sínum, og áðrenn langt var liðið, varð hann tikin inná væl lýddda talvskúlan hjá fyrrverandi heimsmeistaranum, Mikhail Botvinnik.

Á skúlanum slapp tann ungi Kasparov at fáa frálæru frá nøkrum av bestu talv-lærarunum í heiminum, eins og mótstøðumenninir á skúlanum taldust millum mest evnaríku telvararnar. Millum hesar kunnu eitt nú nevnast hin navnframi Anatoly Karpov og Artur Yuspov, sum seinni er vorðin ein av venjarunum hjá Viswanathan Anand.

Tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn fyrstu stóru úrslitini av áhaldandi venjingini komu til sjóndar. Sum 13 ára gamal vann Kasparov russiska unglingameistaraheitið, og longu sum 17 ára gamal varð hann alheims unglingameistari, umframt at hann longu tá hevði ognað sær heitið sum altjóða stórmeistari.

Skjóta búning hansara í talvheiminum viðførdi eisini, at fólk nú av álvara høvdu lagt til merkis styrkir hansara í talvinum. Hansara evni at hugsa, analysera, rokna og granska telvingina vóru longu nú um at gerast legendarisk.

### Alheimsgerðin

Veruliga heimsgitin – eisini út um talvheimin – varð hann tó ikki fyrr enn í 1984. Bert 21 ára gamal slapp hann at royna seg móti táverandi heimsmeistaranum, Anatoly Karpov, og tað skuldi vísa seg at gerast ein risa stór avbjóðing hjá heimsmeistaranum, tó at fyrstu talvini ikki góvu ábendingar um hetta.

Karpov vann nevnliga fýra av teimum fyrstu átta talvunum, og hevði bert ein sigur afturat fyri neyðini, men so lætt skuldi hann ikki sleppa. Allur talvheimurin helt ondini, meðan teir báðir telvaðu 17 javnleikir á rað, og at enda noyddist altjóða talvsambandið at ógylda dystin, tí telvararnir báðir vóru overvaðir

Árið eftir slapp hann aftur at royna seg móti Karpov, og eftir enn ein strævnan dyst var nú greitt, at Kasparov var vorðin yngsti heimsmeistarin á talvsøguni. Bert 22 ára gamal.

Síðani hevur hann við jøvnum millumbilum vart heitið. Millum annað við trimum dystum móti Karpov, meðan Nigel Short og Viswanathan Anand eisini hava roynt seg uttan úrslit.

Ikki fyrr enn í vár noyddist Kasparov at geva seg, tá Vladimir Kramnik óvæntað koppaði meistaranum. Ein sannur meistari verður tó ikki liggjandi leingi, og sum omanfyri nevnt, verður tað roknað fyri vist, at Kasparov innan leingi fer at taka heitið aftur frá Kramnik.

### Varparin

Umframt at vera í serflokki sum telvari, so hevur Kasparov meira enn nakar annar verið við til at breitt talvítróttina út um allan heim. Eins og ein Michael Jordan í Basketball, ein Pele í fótbólti ella Tiger Woods í golf, hevur Kasparov gjørt seg sjálvan til eina alheims fyrimynd hjá ungum telvaru. Somikið stórt er navn hansara, at handilsfólk tosa um Kasparov sum eitt vørumerki á hædd við størstu alheims fyritøkurnar.

Sum ambassadørur fyri talv hevur eingin verið í nær námind avrikum hansara. Millum størstu avrik hansara kunnu nevnast dystirnir móti Deep Blue. Sterku talvtelduni hjá IBM, sum hann snýtti við at gera óvnæntaðar leikir, ið fingu skjóttgangandi algoritmurnar í telduni at sveiggja.

Fyri talvítróttina kann neyvan heldur undirmetast, hvussu hann fekk ítróttina alt meira á sjónvarpsskíggjan, tá hann við snartalvsdystum móti Nigel Short var hin fyrsti at sýna talv sum eitt ítøkjuligt sjónvarpsundirhald.

Eisini hevur hann opna ein altjóða talvskúla, sum hevur til endamál at kveikja áhugan hjá unglingum fyri telvingini, men størsta avrik hansara yvirhøvur er helst mátin, sum hann hevur megnað at gjørt nýtslu av alnetinum. Eitt nú við at telva ein opnan dyst á alnótini móti øllum heiminum, umframt at hann alla tíðina hevur ført alnetið fram sum ein miðil, sum í alstóran mun kann koma telvingini til góðar.

Vit enda tí greinina við einum sitat, frá konginum sjálvum, har hann greiðir frá sínari fatan um telving á alnetinum.

- Talv er heimahoyrandi á alnetinum. Her skapa vit í roynd og veru ein heim, har alskyns hendingar kunnu fara fram, og sjálvur rokni eg við, at hetta gevur talvinum góðan møguleika at gerast ein fólkaítrótt innan stutta tíð.